**UTTAN ÚR HEIMI**

## Holkeri fer frá

Fyrrverandi finski forsætisráðharrin, Harri Holkeri, leggur nú frá sær sum serligur ST-sendimaður í Kosovo. Holkeri tók við starvinum í Kosovo í august í fjør, og ætlanin var, at hann skuldi røkja starvið í eitt ár. Men týsdagin boðaði hann frá, at hann fer frá nú av heilsuávum.

Harri Holkeri var fyri hvøssum atfinningum, tá serbar og albanar brustu saman í Kosovo fyri tveimum mánaðum síðani. 19 fólk doyðu í samanbrestunum, áðrenn tað eydnaðist ST-hermonnunum at sissa partarnar. Serbisku myndugleikarnir funnust tá hvassliga at Harri Holkeri og kravdu, at hann bleiv koyrdur frá sum serligur ST-sendimaður í Kosovo.

Harri Holkeri hevur havt aðrar uppgávur uttan fyri Finnland. Eitt skifti var hann formaður á ST-aðalfundinum, og hann hevur eisini verið virkin í royndunum at fáa frið í Norðurírlandi.

## Oljan gevur dýrar ferðir

Tann høgi oljuprísurin hevur gjørt, at fleiri reiðarí og flogfeløg umhugsa at leggja eitt serligt oljuavgjald á ferðaseðlarnar, og summi feløg hava longu gjørt tað.

Danska reiðaríið DFDS legði í gjár 20 krónur oman á hvønn ferðaseðil við ferjunum, sum sigla ímillum Danmark og Bretland og ímillum Danmark og Noreg. Jes Svare, marknaðarleiðari hjá DFDS, sigur við Jyllandspostin, at ferðaseðlaprísurin varð ásettur fyri einum ári síðani, men hesa tíðina er oljan dýrkað so nógv, at prísirnir halda ikki longur. Tí er oljuavgjaldið lagt omaná. Stena Line, sum eisini rekur fleiri ferjuleiðir, hevur ikki gjørt av, um eitt avgjald skal leggjast á ferðaseðlarnar, men tað verður helst gjørt, sigur felagið.

Flogfelagið SAS boðaði í síðstu viku frá, at tað fer at leggja ímillum 30 og 45 krónur oman á hvønn ferðaseðil frá 1. juni, og British Airways og onnur evropeisk flogfeløg hava sagt, at tey fara eisini at leggja eitt oljuavgjald oman á ferðaseðlaprísirnar.

## Vakurleiki í politikki

Tá italiumenn næstu ferð fara á tjóðartingsval, fáa teir høvi at atkvøða fyri flokkinum Partito della Belezza ella Vakurleikaflokkinum, sum fyrrverandi varamentamálaráðharrin Vittorio Sgarbi hevur stovnað.

Í teirri politisku stevnuskránni sigur Vakurleikaflokkurinm, at hann fer at virka fyri at varðveita tað italska landslagið og teir vøkru býirnar. Flokkurin sigur, at alt ov stórt lendi verða brúkt til skilaleysa bygging, og at alt ov nógvir stórir bygningar misprýða teir vøkru býirnar. Sambært flokkinum eru tað eirindaleysir byggiharrar og embætismenn, sum oyðileggja bæði náttúruna og býirnar.

Vittorio Sgarbi umboðar stjórnarflokkin Forza Italia hjá Silvio Berlusconi, forsætisráðharra í tjóðartinginum. Hann hevur kortini gjørt av, at Vakurleikaflokkurin skal fara í valbólk saman við einum øðrum flokki, nú val verður til Evropatingið.

## Ágangandi svanar

Fólk í enska býnum Mansfield, sum hava hund, verða nú ávarað ímóti ágangandi svanum.

Myndugleikarnir í býnum siga, at ein svanur leyp á ein hund, sum var farin at svimja í einari lund í býnum, og at svanurin var so ágangandi, at hundurin druknaði. Tað sama hendi einum øðrum hundi, og í einum øðrum føri kom ein hundur rættiliga í neyð av einum ágangandi svani.

Tey, sum hava kunnleika til svanar, siga, at steðgin kann ofta vera ágangandi, tí hann roynir at verja bøguna og teirra øki, men serfrøðingar siga, at svanarnir í Mansfield hava verið sjáldsama ágangandi í ár.

# Al-Qaeda líka sterkt enn

**Felagsskapurin hjá Osama bin Laden hevur 18.000 virknar limir, og kríggið í Irak hevur givið felagsskapinum vind í seglini**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Kríggið í Irak hevur gjørt, at uppaftur fleiri síggja Osama bin Laden sum ta stóru fyrimyndina*
*Mynd: Reuters*

Hóast umfatandi tiltøk ímóti yvirgangsfelagsskapinum al-Qaeda bendir alt á, at felagsskapurin hevur tað so gott sum ongantíð fyrr. Tað er í hvussu er niðurstøðan hjá kenda enska granskingarstovninum IISS.

Í einari frágreiðing um al-Qaeda sigur IISS, at fíggjarviðurskiftini hjá al-Qaeda eru góð, at felagsskapurin virkar væl, og at leiðarin, Osama bin Laden, hevur ongantíð verið fyrimyndin hjá so nógvum sum nú. Hetta seinasta kemst av krígnum í Irak.

IISS sigur, at al-Qaeda varð meint raktur, tá Taliban-stýrið varð rikið frá í Afghanistan, men at felagsskapurin hevur megnað at umskipað seg, soleiðis at hann nú heldur til í meiri enn 60 londum, men at hann kortini er at kalla ósjónligur allastaðni. IISS heldur, at helmingurin av teimum 30 ovastu leiðarunum í al-Qaeda og umleið 2.000 limir í felagsskapinum eru deyðir ella tiknir til fanga tey seinastu árini.

Men tað hevur ikki órógvað al-Qaeda stórvegis, skrivar IISS. Stovnurin vil vera við, at felagsskapurin hevur framvegis nóg mikið av pengum, og at hann stuðlar smáum bólkum í londum sum Saudi-arabia, Marokko, Indonesia og Kenya.

### Irak

Bretski stovnurin sigur, at kríggið í Irak hevur givið al-Qaeda vind í seglini, og júst gongdin í Irak kann fáa avgerandi týdning í framtíðini. IISS skrivar í frágreiðingini, at miseydnast royndin hjá amerikanarunum at demokratisera Irak, verður landið ein sonn marra hjá USA og Vesturheiminum í mong ár fram-eftir. Eydnast tað harafturímóti at skipa Irak sum eitt demokratiskt land, fer tað at hava góða ávirkan á alt Miðeystur, og tað fer eisini at skerja møguleikarnar hjá al-Qaeda.

# Eftirlitsnevnd hevur ikki reint mjøl í posanum

**Næstan øll limalondini í einari ST-nevnd, sum skal kanna og forða píning, pína sínar egnu fangar**

PÍNING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

ST hevur sett eina nevnd við umboðum úr tíggju londum at kanna, hvørji lond pína sínar fangar, og hvussu heimssamfelagið kann steðga píningini.

Men sambært mannarættindafelagsskapinum Amnesty International er valið hjá ST sera óheppið, tí níggju av teimum tíggju londunum, sum manna nevndina, pína sínar egnu fangar.

Algeria hevur fingið formansskapin í kanningarnevndini, sjálvt um Amnesty International í einari frágreiðing herfyri staðfesti, at teir algerisku myndugleikarnir pína fangar, sum sekir ella ósekir verða settir í samband við yvirgang.

Hini londini í nevndini eru Kongo, Senegal, Kili, Ekvador, USA, Aserbajdsjan, Kekkia og Georgia. Amnesty International sigur, at í Kongo verða fangar ofta píndir við elektriskum stoyti, og í Senegal hava myndugleikarnir pínt fleiri limir í einum andstøðufelagsskapi. Í Ekvador verða politiskir andstøðingar tiknir og píndir í fongslunum, og Amnesty International ákærir USA fyri at pína fangar í Afghanistan og Irak.

Í Aserbajdsjan hava trygdardeildir hjá innanríkisráðnum lagt ómenniskjaligt trýst á andstøðuleiðarar, í Kekkia fara myndugleikarnir illa við fólki av romanskum uppruna, og tað finnast fleiri frágreiðingar um píning í fongslunum í Georgia, sigur Amnesty International.

**ítróttur**

Nr. 99 • mikudagur • 27. mai 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Kappróður hevur ongantíð verið tryggari

**Sámal Hansen úr Runavík, sum hevur smíðað flestu av nýggju kappróðrarbátunum, dugir ikki at síggja nakran sum helst trupulleika við trygdini á hesum**

KAPPRÓÐUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Tað sá ógvusligt út, tá nýggi hósvíkingur fór í knús leygardagin, men tann hendingin er lítið sigandi fyri góðskuna av bátinum, sigur bátasmiðjurin*
*Mynd: Jens Krisitan Vang*

Í kjalarvørrinum á hendini leygardagin, tá nýggi Hósvíkingur fór í smildur, hava røddir verið frammi, sum ivast í tryggleikan á nýggju kappróðrarbátunum. Fólk hava hildið, at so smekrir, sum bátarnir nú verða gjørdir, er lítið og einki hald í teimum, og tí er eisini onkur, sum er farin at ivast í trygdini hjá kappróðrarfólkum.

### Dimensiónirnar eru óbroyttar

Tann bátasmiðjurin, sum hesi seinnu árini hevur smíðað nógv flestar kappróðrarbátar, er Sámal Hansen í Runavík, og hann ivast so ikki í trygdini hjá róðrarfólkunum.

– Nú kann handan hendingin við Hósvíkingi so ikki sammetast við tað, sum fyriferst á sjónum. Báturin varð slongdur av vogninum, og er farin bóltandi gjøgnum bøin við kanska 80 km/t, og tað sigur seg sjálvt, at slíka viðferð tolir hann ikki.

Hvussu var og ikki, so sóu myndirnar av sundurskrædda bátinum ógvusligar út. Tunnu borðini á bátinum tóktust mest álík pinnabrenni, men heldur ikki hetta tykist vera nakað, sum fær nakran sum helst ótta í bátabyggjaran.

– Sjálvandi er ein kappróðrarbátur eitt sindur smekrari, enn ein bátur, sum verður nýttur til útróður, men heilt so stórur er munurin kortini ikki. Borðini, sum eg nýti, eru 10-12 mm, og tað er so somu dimensiónir, sum Niklas í Koltri plagdi at brúka, tá hann á sinni smiðaði størsta partin av kappróðrarflotanum. Og so kann leggjast afturat, at kjalarborðið og flatborðið eru væl sverari. Upp ímóti tumma tjúkk, sigur bátabyggjarin. Øll onnur mát – bond, stokkar, bekkir v.m. – eru júst tey somu, sum Niklas nýtti, so har skuldi alt verið í lagi.

– Á einum vanligum útróðrarbáti eru borðini á leið 16 mm, so størri enn tað sama er munurin so heldur ikki. Og tá skal so eisini minnast til, at tann báturin er bygdur til heilt onnur viðurskifti. Er veðrið ófantaligt, so verður gjarna slettis ikki róð við einum kappróðrarbáti, tí róðrarfólki fær kortini einki burturúr venjingini tá.

### Ongantíð verð tryggari

Soleiðis er tað á ongan soleiðis, at bátabyggjarin sjálvur situr við kaldasveitta og lurtar, tá róð verður kapp kring landið. heldur ikki, um talan av og á kann vera um heldur keðilig veðurlíkindi.

– Nei, tað er tað so slettis ikki. Hesir bátarnir eru so í øllum førum eins tryggir, og kappróðrarbátar hava verið tey nógvu seinnu árini. Styrkin á bátunum er so ríkilig til brúkið, og skuldi tað verið spurningurin, so kundu teir ivaleyst væl verið smekrari, enn teir eru. Í øllum førum, um tað bert var trygdin, sum atlit skuldu takast til.

– Og afturat tí, so er tað jú eisini soleiðis, at tað nú er kravt, at bátarnir skulu hava bjargingarvestar umborð. Tíbetur er tað sera sjáldan, at tørvur er á hesum, men tað bøtir so eisini um trygdina, so alt í alt haldi eg, at tað ongantíð hevur verið tryggari at rógva kapp, enn júst nú, sigur bátasmiðjurin.

### Flutningurin er trupulleikin

Ein trupulleiki heldur Sámal tó vera, og tað var júst tann trupulleikin, sum gjørdi seg galdandi hjá Hósvíkingi. Nevnliga flutningurin.

– Í dag eru tað fleiri av feløgunum, sum hava fingið sær serligar vognar til flutning av bátunum. Hesir vognarnir viga lítið og einki, og báturin sjálvur vigar enn minni. Tí kann tað væl verða ein trupulleiki við trygdini hjá bátinum sjálvum, tá hann verður fraktaður millum ymsu støðini. Kemur ein hvirla, so er báturin jú soleiðis av skapi, at vindurin trýstur hann uppeftir, og er ferðin tá um einar 80 km/t ella har á leið, so munar tað lítið, hvussu handverkið og tilfarið eru. Tá fer báturin illa, og í flestu førum somikið illa, at hann verður vrak, sigur Sámal Hansen at enda.

## Úr at gera



*Mynd: kez*

Seinnu árini er ein støðug útskifting av føroyska kappróðraflotanum farin fram, og sum gongdin er í løtuni, so er einki, sum bendir á, at útskiftingin er um at vera liðug.

Bátasmiðjurin, sum hevur bygt flestu av nýggju bátunum, er Sámal Hansen, og hann hevur í øllum førum úr at gera.

– Báturin, sum eg í løtuni eri í ferð við at gera, er nummar 36 í røðini, og her og nú havi eg eini 10-12 bátar niðurfyri at smíða, so hjá mær er bara at arbeiða við fullari ferð, heldur hann.

Tað er annars ikki fyrr enn seinastu fýra árini, at bátasmíðið hjá Sámali veruliga hevur fingið ferð á. Fyrsti kappróðrarbáturin hjá honum var Kjølur, sum varð bygdur í 1996. Í 1998 var hann so maðurin, sum stóð aftan fyri Eysturoyingin, og tá var tað, at fólk veruliga fóru at tosa um nýggju bátarnar. Ikki minst eftir at gula 10-mannafarið vant burtur úr øllum í samfullar róðrar tvey ár á rað.

– Í sambandi við at eg smíðaði nýggjan Havnarbát og Nólsoying, fekk eg mær so eina lítla pausu frá arbeiðinum sum smiðjur. Hetta var í januar mánaði í 2000, men tann pausan er so bara longd. Eg havi so ikki verið í gamla starvinum síðani, sigur Sámal.

Og við 10-12 afturat á bíðilistanum tykjast útlitini fyri hesum heldur ikki at vera so øgilig. Sámal smíðar framvegis við fullari ferð, og samstundis fækkast talið av vælkendu bátunum, sum Niklas í Koltri á sinni smíðaði.

**-jm**